## HB-dreingir til Danmark

Í døgunum 31. juli til 6. august fer eitt smádreingjalið hjá HB til Keypmannahavnar at luttaka í elitukappingini KB Cup. Kappingin er fyri innboðin lið, og umframt HB taka eitt nú KB, Brøndby, FC Midtjylland, OB Malmø FF lut. HB-smádreingirnir skulu búgva hjá KB alla tíðina, og tíð verður eisini til venjing.



## Fótbóltsfrøi í Irak

Rættiliga óvæntað er Irak vorðið asiatiskur meistari í fótbólti. Tað hendi í gjár, tá Irak og Saudiarabia spældu finaluna í indonesiska høvuðsstaðnum Jakarta. Úrslitið varð 1-0 til Irak. Sigurin fekk fleiri túsund irakar út á gøturnar í Bagdad at fagna landsliðnum, og hesa løtuna gloymdu fólk bumbur og annan yvirgang, skriva tíðindeastovurnar.

# Øgiliga stolt av dóttrini

**Ólavsøkuaftan vann róðurskvinnan á Jarnbardi, Jannie Dam Jacobsen, sín 50. stevnusigur, og mamman var ógvuliga stolt av dóttrini. – Ja, hetta er øgiliga gott, og eg eri líka stolt av henni hvørja ferð**

KAPPRÓÐUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tað er eingin ivi um, at nógvir rógvarar í landinum munnu hava nógv sera flott avrik og nógvar sigrar at vísa aftur á, men ólavsøkuaftan leygardagin megnaði róðurskvinnan umborð á Jarnbardi, Jannie Dam Jacobsen, sum tann fyrsta í føroyskari rógving at røkka 50 stevnusigrum, og hetta má metast at vera eitt satt bragd.

Jannie byrjaði at rógva við Jarnbardi í 1996, og líka síðani hevur hon verið fastur fúsur umborð á Jarnbardi. Hetta hevur á hesi 12 árini ført sjey meistaraheitið og 50 stevnusigrar við sær.

Eftir róðurin á ólavsøku, har Jarnbardur vann ein sannførandi sigur, fingu v it orðið á Jannie og mammuna, Shirley.

Jannie var sjálvandi sera fegin um bæði sigurin á ólavsøku og um FM-heitið, og hon var eisini ógvuliga fegin um at røkka 50 sigrum.

- Tað er ræðiliga stuttligt at fáa at vita tað, at man er mest vinnandi rógvari í Føroyum. Eg visti faktiskt ikki sjálv av hesum, fyrrenn eg hoyrdi tað frá einum blaðmanni eftir vestanstevnuna, sigur Jannie.

Jannie var tó ikki tann einasta, sum gleddist um sigurin í ár og um teir 50 stevnusigrarnar. Mamma hennara, Shirley, var eisini ógvuliga glað og stolt av dóttrini.

- Eg eri øgiliga stolt av dóttrini. Eg plagi at vera við til hvørja einastu stevnu, so eg eri eisini rættiliga spent, sigur Shirley.

Hon sigur tó víðari, at hon kanska ikki hevur við heilt frá byrjan av, men eg haldi tað vera ægiliga flott at hon hevur vunnið 50 ferðir.

- Eg var kanska ikki við til allar stevnurnar heilt frá byrjan av, men tú hyggi eg hvørja ferð. Eg haldi eisini, at tað er ótrúliga flott av henni, at hon hevur klárað at vunnið 50 ferðir, og tað skal ikki vera nakar ivi um, at eg eri líka stolt av henni hvørja ferð, sigur mamman at enda.

Við sigrinum á ólavsøku hevur Jannie rokkið einum fantastiskum tali av sigrum, og tí verður spennandi at síggja, um hon fer at halda fram at rógva, ella um hon ætlar at steðga við teimum 50 sigrunum, sum hon longu hevur tryggjað sær.



*Tað er ræðuliga stuttligt at fáa at vita, at man er mest vinnandi rógvarin í Føroyum, segði róðurskvinnan umborð á Jarnbardi, Jannie Dam Ja*

# Jarnbardur er f

**Jarnbardur hevur vundið burtur úr hinum bátunum hjá 6-mannaførum við kvinnum í ár, og í hvørjum róðri hava tær verið langt framman fyri. Meistaraheitið í ár er eisini tað 10. tey seinastu 17 árini, og harafturat megnaði róðurskvinnan, Jannie Dam Jacobsen, at vinna sín róður nummar 50 á ólavsøku**

KAPPRÓÐUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyrsta bátsmanningin, sum kom ósigrað ígjøgnum júst farna kappingarár, var kvinnumanningin umborð á 6-mannafarinum Jarnbardi, sum vann allar sínar róðrar sera sannførandi.

Fyrstu róðrarnar á árinum var risastórur munur niður til næstu bátarnar, meðan serliga Kollfirðingur royndi at geva kvinnunum umborð á Jarnbardi kapping næsta stevnurnar. Sjálvt um úrslitini hjá Kollfirðingi blivu betri og betri, somegnaðu kvinnurnar á Jarnbardi tó at skúgva alla mótstøðu til viks á hvørjari stevnu.

Á vestanstevnu fyri góðum tveimum vikum síðani vann Jarnbardur enn ein sannførandi sigur, og eftir henda sigurin kom fram, at Jannie Dam Jacobsen, sum hevur verið róðurskvinna umborð á Jarnbardi síðani 1996, vann sín FM-sigur nummar 49, og tí bíðaðu nógv í spenningi til ólavsøkuna, tá sigur nummar 50 væntandi fór at koma.

### Jarnbardur hevur vunnið alt

Jarnbardur hevur eisini eina glæsiliga søgu aftan fyri seg. Í 1991 – árið eftir at báturin bleiv bygdur – vann Jarnbardur sítt fyrsta føroyameistaraheitið, og bæði í 1992 og í 1993 endurtóku tær bragdið. Uttan endiliga at vita tað løgdu kvinnurnar, sum tá róðu við Jarnbardi, lunnar undir eina fantastiska tíð hjá einum av mest vinnandi bátum í landinum.

Næstu árini megnaði Jarnbardur ikki at liva upp til tey trý meistaraheitini, sum komu í hús fyrst í 90-árunum, men árið 1996 gjørdist tó byrjanin til enn eitt gott tíðarskeið hjá Jarnbardi. Hetta árið blivu tær nummar tvey í FM-kapp-